

langtandi við Jensiu og Teresu, sum fara heim at balla seg. Og so kveitir Hansina yvir á respiratorsjúklingin innan fyri rútin.

– Hatta er tolnasta menniskjað í verðini, sigur hon, og í sama andarhaldi rósar hon respiratorsjúklinginum fyri sín sniðfundiga humor og spíska speisemi.

Innan fyri vindeyguni beint uppi yvir Álakeri mannar respiratorsjúklingurin seg upp. Hann hevur gramt seg um pínu, og tí skal Bjarne Jørgensen, oyra-, nasa- og hálslækni, kanna hann. Fýra sjúkrasystrar eru hjástaddar, meðan sjúklingurin verður eftirhugdur við fipurskopii. Fyrst kikar Bjarne gjøgnum andingarholið í hálsinum niður í lungnapípurnar. Sjúklingurin andar av almakt ímeðan og er sera sperdur. Anna heldur fast í hondina á sjúklinginum. Men serlæknin sær eingi sár. Allar slímhinnur eru normalar. Men iltinnihaldið er bara 65%, so nú verður andahjálpin sett tilaftur.

– Flott, sigur Anna við sperda og sveittandi sjúklingin og leggur ein kaldan lappa á pannuna á honum.

Tá ið iltinnihaldið aftur er í lagi, hyggur Bjarne millum annað eftir opinum til vældindið. Heldur ikki har svøllur.

– Allarhelst er tað bara vanligt stikni fyri at hava eitt fremmandalikam í barkanum. Tað oyðileggur ofta svølgskipanina og gevur pínu, tá ið sjúklingurin flytur høvdið. Eg kann einki annað siga enn, at alt er, sum tað skal vera. Hann má læra at liva við, at eitt fremmandalikam er gjøgnum hálsin. Tað er jú ikki normalt ...

## Akutt heilabløðing

Saman við einum ungum turnuslækna, ið er tungur á fótum av handbókum og øðrum alneyðugum lummauppsløgum, hava Maria og Tórgerð úr at gera á skaðastovuni. Tær royna at innbinda eitt øklasár, ið ein trý ára gomul genta fekk, tá ið hon rendi fótin í eitt súkkluhjól.

– Nei, nei, nei, nei, nei, skríggjar gentan.

Men Maria ber skjótt at. Brádliga hevur hon sett eitt plástur á sárið, og so verður bundið inn.

– Góðasta, uggar mamman, meðan pápin leggur hondina á økslina á higstrandi gentuni.

Løtu seinni leggur Tórgerð eitt firvaldaplástur á ein fýra ára gamlan drong. Ein plastikkkrokodilla kom fúkandi gjøgnum barnagarðsrúmið og brast á ovaru vørr. Sambært samtyktunum sleppur drongurin at velja sær tvey smá leikapetti, tí hann er so raskur. Hann tekur tveir snurritoppar.

– Skalt tú ikki hava ein bát, spyr pápin ørkymlaður.

Stutt eftir situr ein 26 ára gamal maður í sama rúmi. Hann hevur fingið eina jarnstong í tinningin, sum er bólgnaður upp. Einki bendir á skaða. Kom aftur, um tað fer